

## Bretar fylla seg við heilivági

Næstan helmingurin av teimum bretunum, sum eru farin um tey 65, taka meiri enn fimm sløg av heilivági um dagin. Tað sæst í einari kanning, sum apoteksverkið hevur gjørt. Kanningin vísir eisini, at nógvir bretar halda fram við at taka heilivág ímóti ymsum sjúkum, eftir at tey eru vorðin frísk. 20 prosent av teimum spurdu viðganga, at tey halda seg ikki altíð til vegleiðingina frá læknanum. Talsmaðurin hjá bretska apoteksverkinum sigur við BBC, at fólk, sum eru í minsta iva um tann heilivágin, sum tey fáa, eiga at spyrja seg fyri hjá egnum lækna ella á apotekunum heldur enn at royna seg fram.

## StatoilHydro fann olju í USA

Saman við starvsfelaganum Anadarko hevur norska oljufelagið StatoilHydro funnið olju á einari leið í tí amerikanska partinum av Meksikanska Flógvanum. Brunnurin er í einum øki, sum eitur Mississippi Canyon. Brunnurin er næstan 9.800 metrar djúpur. Har hava feløgini funnið eina rættiliga stóra keldu, men enn ber ikki til at siga, hvussu nógv olja kann vera har, sigur StatoilHydro í tíðindaskrivi. Leiðin er í einum øki, sum eitur Vita, og har eigur tað norska felagið 25 prosent av rættindunum. Hini feløgini eru Shell og Anadarko. Hetta er tannars riðju ferð í hesum árinum, at tað norska felagið kemur fram á olju í Meksikanska Flógvanum.

# Tórshavn væl á veg

**Síðani 2006 hevur Tórshavnar býráð gjørt íløgur fyri 100 milliónir krónur í nýggjar kloakkskipanir, sum lúka krøvini, sum Umhvørvisstovan hevur sett í sínum uppskoti til kunngerð á økinum**

UMHVØRVI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Hetta er annað valskeiðið hjá sitandi býráðssamgongu í Tórshavn, og heilt frá byrjan hevur hon lagt stóran dent á umhvørvið.

Ikki bert í sjálvum høvuðsstaðnum, men eisini í bygdunum, sum eru lagdar saman við Havnini seinastu valskeiðini, eru nýggjar kloakkskipanir gjørdar.

Í Hesti eru allar kloakkir lagdar av nýggjum, og lúka nú ásetingarnar í uppskotinum hjá Umhvørvisstovuni umkloakkskipanirhjákommunum í Føroyum. Hetta arbeiðið var liðugt í 2007.

Og so seint sum í síðstu viku var arbeiðið við nýggjari kloakkskipan í Nólsoy avhendað. Frá at hava havt 15 ymiskar útleiðinar, harav átta vórðu leiddar út í havnarlagið, eru nú bert tvær útleiðingar. Ein høvuðsútleiðing, sum liggur norðan fyri grótkastið á Kirkjutanganum, meðan hin liggur út úr Halgutoftum, sunnan fyri sunnara grótkastið.

Hendan íløgan hevur kostað býráðnum tilsamans 7,5 milliónir krónur. Tá er asfaltering íroknað.

Býráðið hevur síðani 2006 gjørt íløgur fyri tíggjutals milliónir í kloakkir, og aftur komandi ár verður millióna upphædd sett av til hetta endamál.

Tórshavnar kommuna er ein av kommununum, sum hevur arbeitt eftir uppskotinum hjá Umhvørvisstovuni, og nú kunngerðin verður sett í gildi, fær kommunan eina longda freist fram til 2015 at fáa øll viðurskifti í lagi.

Og tað kemur helst væl við, tí kloakkskipanin í bæði Kirkjubø og á Velbastað er eitt eindur ógreið.

Men Tórshavnar kommuna man vera tann kommunan í landinum, sum er komin longst ávegis at lúka komandi treytir fyri kloakkskipan í Føroyum.



*Marin Katrina Frýdal er forkvinna í Teknisku nevnd hjá Tórshavnar kommunu, sum umsitur eitt nú kloakkskipanina í kommununi*
*Mynd: Leo Poulsen*

# Umhvørvis kunngerð klár í august

**Tilmæli um kunngerð um kloakkviðurskiftini hjá kommununum, sum Umhvørvisstovan fyri nøkrum árum síðani gjørdi, er nú langt um leingi klár at seta í gildi**

UMHVØRVI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Annika Olsen, innlendismálaráðharri, fer innan ein mánað at seta nýggja kunngerð um kloakkviðurskiftini hjá kommunum í gildi*

Tað er eftir hondini rúm tíð síðani, at Umhvørvisstovan gjørdi uppskot til kunngerð um kloakkviðurskiftini hjá kommununum, men í langa tíð lá tað bara og samlaði dust í skuffunum í Innlendismálaráðnum.

Men eftir at Annika Olsen tók við sum innlendismálaráðharri, er gongd komin aftur á málið.

- Tá tit í januar gjørdu vart við málið, tók eg tað fram, og legði tað fyri landsstýrisfund. Men av tí at málið tá var vorðið rættiliga gamalt, og av tí, at bert fáar kommunur høvdu havt høvi at gjørt viðmerkingar til uppskotið um kunngerð, var mett rættast at senda uppskotið til nýggja hoyring, sigur Annika Olsen.

Slík hoyringsskriv hava rímiliga langar freistir, men svarini frá kommununum eru komin inn í juni.

- Av tí at feriutíðin kom í vegin, náddi eg ikki at fáa hetta málið avgreitt áðrenn. Men so skjótt, sum feriutíðin er av, verður uppskotið lagt fyri landsstýrið, og tá tað er góðkent har, er klárt at seta tað í verk við kunngerð, sigur Annika Olsen.

Landsstýriskvinnan í innlendismálum roknar tí við, at á fyrsta ella næsta landsstýrisfundi í august verður uppskotið lagt fram og góðtikið.

Tað er undirtøka fyri uppskotinum í landsstýrinum og millum kommunurnar, og tað er ikki neyðugt at fara í tingið við einari kunngerð, sum einans skal góðkennast av landsstýrinum.

### Gott tiltak

Nakrar kommunur hava arbeitt sum um kunngerðin longu var komin í gildi, og summar teirra vita enntá ikki betri. Men kunngerðin kemur nú, og tí eru tær kommunurnar upp á forskot við tíðina, sum hava arbeitt eftir uppskotinum hjá Umhvørvisstovuni.

- Hetta er eitt gott uppskot í allar mátar, tí samstundis sum tað verjir okkara umhvørvi, er hetta eisini ein arbeiðsskapandi kunngerð. Og hóast hetta kemur at kosta kommununum nakað av peningi, so skuldi tað kortini komi væl við nú so nógv verður tosa um at fáa ferð aftur á búskapin, sigur Annika Olsen.

Tað verður sjálvandi neyðugt at broyta freistirnar í upprunaliga uppskotinum hjá Umhvørvisstovuni. Frá at nýggja skipanin skuldi verða sett í verk innan 1. januar 2010, verða nýggju freistirnar nú 1. januar 2011 til at kommunurnar skulu hava projekterað arbeiðið, og 1. januar 2015 at føra tær út í verki.

- Nýggja kunngerðin hevur ásetingar um, at alt kloakkvatn skal førast út á streymasjógv, og at úlátið skal verða ein metur undir sjógv, tá fjøra er. Eisini skal alt kloakkvatn reinsast, áðrenn tað verður leitt út á streymasjógv, sigur Annika Olsen.

So innan ein mánað vita kommunurnar gjølla, hvat tær hava at halda seg til viðvíkjandi kloakkviðurskiftum.